## Sakna Kuupik Kleist



Andstøðan í grønlendska Landstinginum heldur, at Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, er ov sjáldan á tingfundi. Malik Berthelsen og Finn Karlsen, sum eru formenn í tingbólkunum hjá ávikavist Siumut og Atassut, siga, at landsstýrisformaðurin er ikki nóg virkin, tá týðandi samfelagsmál verða viðgjørd. Sambært teimum báðum hevur landsstýrisformaðurin bara tikið lut í einum orðaskifti, síðani hendan tingsetan byrjaði tann 25. september. Kuupik Kleist sigur, at hann fylgir við øllum orðasskifti í tinginum, og at hann er í tingsalinum hvønn dag.

## Verja fiskivinnuna

Í dag byrjar ráðstevnan „International Arctic Fishery Symposium“ í býnum Anchorage í amerikanska statinum Alaska, har fólk fara at tosa um, hvat skal gerast fyri at verja fiskastovnarnar í tí arktiska økinum ímóti dálking fyri ferðamannaskipum og einari komandi oljuvinnu. Ein av luttakarunum, Lene Kielsen Holm, sigur við grønlendska kringvarpið, at ráðstevnan fer millum annað at kanna, hvørjar avtalur eru galdandi fyri fiskiskap í økinum, og síðani skal ráðstevnan orða eitt uppskot um, hvussu fiskurin og annað tilfeingið kunnu verjast ímóti møguligari dálking.

# Børn skipaðu fyri mentanardegi

**Leygardagin var mentanardagur fyri børn í Havn. Børnini á Margarinfabrikkini skipaðu fyri saman við Tórshavnar kommunu. Bæði skattaveiða og tónleikur vóru á skránni**

BARNADAGUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Inna Törnroos og Jákup Mørk*

Børnini á Margarinfabrikkini skipaðu leygardagin fyri mentanardegi fyri børn. Stór undirtøka var, og børn í øllum aldrum luttóku.

Barnakonsert var í nýggju Perluni við Jensinu Olsen, har børnini tóku sínar bamsu við, umframt, at Sanne Storm, musikterpeutur, undirvísti børnum í dansi og tónleiki.

Eisini varð skipað fyri skatta veiðu á Skansanum, har sjórænarar leiddu veiðuna eftir einum fjaldum skatti.

Í Margarinfabrikkini var eisini lív í. Børnini vístu síni verk fram, og tónleikur var eisini á fabrikkini. Umframt alt hetta greiddi Siri Davidsen frá søgum, sum hon í hugnaligum umstøðum á Margarinfabrikkini greiddi frá.



*Nógvir lítlir sjórænarir vóru at síggja á gøtunum*





*Børn, vaksin og bamsur vóru til dramakonsertina hjá Jensinu Olsen*



*Á Býarbókasavninum varð gitt hvør sum átti hattin*



*Sera nógvir sjórænarar vóru at síggja á Skansanum leygardagin*



*Bamsurnar dansaðu til tónleikin hjá Jensinu Olsen*



*Jensina Olsen fekk børnini at syngja við uppi á pallinum*



*Sjórænarirnir Skalla og Skøltur leitaðu eftir skattum á Skansanum*

